# Victor – ein Guds profet



**Tá standmyndin av Victori Danielsen varð avdúkað í Fuglafirði sunnudagin, helt Zacharias. Zachariassen fyrilestur um henda megnarmannin. Í hesum blaðnum kemur fyrri partur av fyrilestrinum**

Eftir áheitan frá mentanarnevndini og standmyndanevndini í Fuglafjarðar býráð, sum eg takki hjartaliga, er tað mær ein heiður á hesum merkisdegi, at halda ein stuttan fyrilestar um merkismannin, mentamannin og trúboðaran, Victor Danielsen, sála, hvørs minnisvarði í dag er vorðin avdúkaður. Hetta, sum eg skal siga, verður eyðvitað bert ein lítil og ófullfíggjað mynd ella lýsing av hesum stórmenni.

Fyrrverandi mentamálaráðharri, Jógvan á Lakjuni, tekur soleiðis til um abba sín, Victor:

„Ein av teimum monnum, ið altíð fara at verða goymdir í søguni her á landi, er Victor Danielsen. Hann var ein av teimum, ið gav alt lívið fyri hugsjónir sínar, tær hugsjónir, hann sum blaðungur fekk. – Og úrslitið sæst eftir hann. Hóast hann alt lívið var nívdur av likamligum veikleika, og hóast mótstøðu, so var hann ein ótroyttiligur arbeiðsmaður í Harrans víngarði. Hann fór undir og helt á at stríðast fyri tað, sum hann hevði sæð at vera tað størsta her í lívinum: at tæna Jesusi Kristi, sum bjargaði honum frá ævigum dómi."

Lat meg byrja við at siga, at eg hevði tann framíhjárætt í barna- og ungdómsárum mínum, at kenna og hoyra Victor Danielsen. Hann vitjaði stundum inn á gólvið í barnaheimi mínum í Gøtu. Tað var við stórari virðing, tú eygleiddi henda mann og lurtaði eftir hvørjum orði, hann segði. Ikki minst, tá ið hann haltandi fór upp á talarapallin og helt sínar magnfullu røður.

Seinastu ferð, eg tosaði við Victor, var meðan eg var heima í summarfrí í 1960 frá skúlanum, har eg las í Onglandi, og vit høvdu brævaskifti til tríggjar mánaðir, áðrenn hann doyði – á kyndilsmessu í 1961.

## Barnaárini

Victor Danielsen var føddur 28. mars 1894 í Søldarfirði. Foreldur hansara vóru Dánjal Jacob Danielsen, sýslumaður og Anna Malena Weihe. Hann var yngstur av 7 systkjum. Mamma hansara doyði, tá ið hann bert var eina viku gamal.

Í móður stað kom fastir hansara Lina, sum kom í húsið, meðan hann var heilt lítil. Hon elskaði henda lítla drongin, ið henni varð litin í hendur. Victor sigur sjálvur soleiðis frá í eini talu:

„Eg minnist, tann gamla pápasystir mín, sum var mær í móður stað – eg gjørdist móðurloysingur, tá ið eg varð føddur – hon segði fyri mær, at einaferð, tá ið eg var ógvuliga lítil – tá var ikki so lætt at koma til lækna sum nú – eg varð so ógvuliga sjúkur; og ikki sá betur út, enn at tað mátti vera lungnabruni. Hon visti hvørki út ella inn ta einu náttina. Tað sá út, sum eg skuldi doyggja; og hon rópti til Gud. Hon var einslig: og tað einasta, sum hennara hjarta hekk við fram um alt á jørðini, var hetta lítla barnið, sum hon hevði fingið at taka sær av.

Hon rópti til Gud. Og hon helt fast uppá allar sínar dagar, at hon merkti, at ein eingil kom inn í stovuna og stakk nakað í munnin á mær.

Alt hetta, kæru vinir, hevur bitið seg fast í mítt hjarta...", segði Victor.

Victor var spardur!

Hesin smádrongur skuldi seinni ikki bert hava veldiga ávirkan á samtíð sína, men eisini seta so djúp spor eftir seg, at tey aldri fara at kámast burtur her heima á landi. Navn hansara stendur rist inn í tjóðskaparsøgu- eins og kirkju- og samkomusøgu Føroya fólks.

Victor vaks so upp og var heldur veikur likamliga, men hann var vitugur og ógvuliga næmur. Hann sigur frá, at einaferð, tá ið hann 8 ára gamal, var og vitjað fastur sína Onnu á Strondum, sum var gift við Bartal Gjærdum, hevði Bartal fragd av at biðja Victor bera fram eitt heilt kvæði uttanat, sum hevði samfull 80 ørindi. Tað stóð ikki á! Hann hevði sjálvur lisið sær tað til longu so ungur.

Í barnaheimi hansara var ein donsk myndabíblia, sum hann hugtikin mangar ferðir sat og blaðaði í. Eisini mintist hann, at pápin – tó at hann einki mál hevði – altíð sang ein ella annan danskan sálm. Hesi barnaminni sukku niður í sálina á hesum unga smádrongi, sum seinni skuldi geva fólki sínum føroyingum Bíbliuna á móðurmálinum og læra tey at syngja lovsangir Harrans á teirra egna tungumáli.

## Á læraraskúla í Havn

Victor var, sum nevnt heldur veikur, men hevði góðan hug til bókina, og Lina, fastir hansara, ávirkaði hann nógv til, at hann í 1911 fór til Havnar á læraraskúla. Hon helt, at tað var tað, ið hann best var egnaður til. Og so var!

Í 1914 fekk hann lærarapróvgv við besta karakteri. Á læraraskúlanum hevði hann Jákup Dahl til lærara í føroyskum, og prósturin gav hesum unga manni gætur og hevur tikið til, hvussu stívur hann var í føroyskum. Hann hevði eisini skaldskaparligar og bókmentaligar gávur, og við tað at hann eisini hevði óføran arbeiðshug, vóru her bestu líkindi til, at Gud kundi nýta hann til at skapa framburð í virki sínum millum føroyingar.

## Verður umvendur

Hesa tíðina í Havn varð hann vaktur andaliga og kom í stóra sálarkreppu og djúpt andaligt myrkur. Hetta var um heystið 1913. Í eini talu, sigur hann, at hann hevði verið á einum fráhaldsfundi uppi undir Varða, og har tók Arthur Brend, trúboðari, orðið, og Victor sigur:

"Eg føldi, at har vóru boð til mín. Og hetta var ein tann fyrsta ferðin, eg føldi, at "Harrin fer vist at kalla á teg. Harrin hevur nakað gott til tín."

Í eini aðrari talu sigur hann: "Tá ið eg kendi, at Harrin kallaði meg og vildi hava meg at koma til Sín, rætti eg mínar veiku hendur út. Og tá kom eg í eitt ræðuligt stríð."



*»Jú, Victor Danielsen hevur fingið nógv av skafti, ja, so nógv, at mangir, ið meira hava lært, røkka honum ikki til kníggja...«, skrivar M. S. Viðstein um Victor Danielsen*

Hann kom í samband við heimamissiónina, og serstakliga við danan, Ryving Jensen, og Victor greiðir soleiðis frá:

"Tann maðurin – ein danskur maður – sum Gud reisti mær til hjálpar, keddist aldri at vitna fyri mær og troysta hjarta mítt við orðinum um Golgata kross." Mangan tók Victor til orðini, ið hesin Ryving Jensen ta einu ferðina segði við hann, har hann sat og græt: "Hesin ungi maður verður einaferð glaður!" Og so varð, sum Victor eisini sigur frá: "Tá ið eg sá ljósið í Kristusi og